MENTAMÁLARÁÐIÐ

# Fulltrúi til gymnasiala miðnámsøkið

***Starvið***
Mentamálaráðið sóknast eftir dugnaligum og ágrýtnum fulltrúa at umsita gymnasiala miðnámsøkið í Mentamálaráðnum. Starvið er áhugavert, fjølbroytt og sjálvstøðugt og verður at seta skjótast til ber.

Høvuðsuppgávurnar hjá fulltrúanum eru m.a. at:

- fyrisita, tryggja menning og samstarv á gymnasiala miðnámsøkinum,
- røkja samskiftið við skúlar, stovnar v.m. umframt at taka sær av málsviðgerð í hesum sambandi,
- fyrisita, endurskoða og menna gymnasialu miðnámsútbúgvingarnar,
- ráðgeva og vegleiða í spurningum innan útbúgving og tilevna uppskot til lógir, kunngerðir, reglur o.a.,
- samskipa og skipa fyri felags átøkum innan økið,
- taka lut í verkætlanum, her ímillum eisini vera verkætlanarleiðari og
- røkja aðrar fyrisitingarligar uppgávur.

Fulltrúin skal tryggja, at nevndu uppgávur verða loystar á einum høgum fakligum stigi, og at mannagongdir eru í samsvari við nútímans krøv.

Arbeitt verður við bygnaðarbroytingum í Mentamálaráðnum, og merkir hetta, at tann setti má tola broytingar í starvinum.

***Førleikakrøv***
Umsøkjari skal:

- hava útbúgving frá hægri lærustovni ella aðra viðkomandi útbúgving,
- kunna arbeiða sjálvstøðugt umframt samstarva í arbeiðsbólkum o.l.,
- vera tænastusinnaðir, fyrikomandi og hava góð samstarvsevni,

.

- hava førleika at menna gymnasiala miðnámsøkið og
- hava áhuga fyri avbjóðingum og vilja til at royna nýggjar leiðir.

Tað er ein fyrimunur, at umsøkjari hevur royndir frá gymnasiala miðnámsøkinum.

***Vit bjóða***
Starvið er spennandi við nógvum skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir. Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi, og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

***Setanar- og lønartreytir***
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um stjórnarráðini, Løgmansskrivstovuna og deildir tess. Arbeitt verður við bygnaðarligum broytingum í Mentamálaráðnum.

***Umsókn***
Umsókn við prógvum, c.v. o.ø skulu sendast til:

Mentamálaráðið
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella til t-post: mmr@mmr.fo

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi **21. november 2017.**

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú seta teg í samband við Poul Geert Hansen, aðalstjóra, á tlf. 555010.

***Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita málsøkini, útbúgving, gransking og mentan, herundir eisini dagstovnaøkið, kirkjumál og onnur trúarsamfeløg, loftmiðlar, ítrótt og annað frítíðarvirksemi. Sí heimasíðu Mentamálaráðsins www.mmr.fo.*